# Flogfar rendi á háhús

Eitt iranskt hernaðar flogfar rendi í morgun á eini háhús í iranska høvuðstaðnum Teheran. Flogfarið fekk tøkniligar trupulleikar stutt eftir, at tað var farið upp frá einum hernaðar flogvølli.

Flogskiparin royndi at neyðlenda á altjóða flogvøllin í Teheran. Men rendi í staðin á eini háhús í eru tíggju hæddir høg, skrivar Berlingske Tidende á síni heimasíðu.

Umborð á flogfarinum vóru 90 fólk. Hesi hava væntandi øll latið lív, men væntandi eru somuleiðis nógv deyð í háhúsunum Berlingske Tidende skrivar, at keldur siga frá, at eldur er komin í nógv hús í grannalagnum.

**nud**



## PRÓVDÓMARI

Søkt verður eftir próvdómara til Koyrikortdeildina at seta skjótast gjørligt. Talan er um eitt fast starv, ið er skipað sum eitt fulltíðarstarv.

### UPPGÁVAN

Uppgávan fevnir í høvuðsheitum um:

- Fyriskipan av koyriroyndum
- Próvdøming av ástøðis og verkligum koyriroyndum
- Dagføring og tilrættisleggjan av próvtilfari
- Avgreiðsla av viðskiftafólki
- Aðrar uppgávur eftir tørvi

### FØRLEIKAKRØV

Vit hugsa okkum ein persón við námsfrøðiligum førleika ella líknandi, sum hevur kunnleika til ferðsluástøði og biltekniska økið. Dentur verður lagdur á góð samstarvsevni, og evni og áhuga at arbeiða sjálvstøðugt við fólki. Viðkomandi má vera fyrikomandi og kundavinaligur, og kunna taka sjálvstøðugar avgerðir í samsvari við galdandi reglur á økinum. Kunnleiki til teldu er ein fyrimunur, og koyrikort til bil ein treyt.

### SETANARTREYTIR

Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Starvssetanin hoyrir undir Vinnumálaráðið við tilhoyrandi stovnum, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

**Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til:**

Tórunn S. Miðberg, deildarleiðara á tlf. 35 04 00 ella 35 04 20. Umsóknir saman við prógvum, starvsroyndum og møguligum viðmælum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 12. desember 2005.

*Akstovan er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur sum endamál at fremja akfaratøkniligar kanningar og akfaraeftirlit, stíla fyri koyriroyndum, útvega fólki koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfaraskráseting, vegskatt og skrásetingargjøld.*

*Umframt høvuðsdeildina í Tórshavn hevur Akstovan sýnsdeildir um alt landið. Á Akstovuni starvast 19 fólk.*

AKSTOVAN

REPROZ

Akstovan | Hoyvíksvegur 57 | Postsmoga 3206 | FO-110 Tórshavn
Tel +298 35 04 00 | Fax +298 35 04 01 | www.akstovan.fo | akstovan@akstovan.fo

Sosialurin Sosialurin i

STARVSLÝSING

## Handverkari

Søkt verður eftir dugnaligum og álitandi handverkara til maskinmiðstøðina í Kollafirði. Maskinmiðstøðin hevur um hendi viðlíkahald av entreprenørmaskinum hjá Landsverki og høvuðsgoymslu av eykalutum og amboðum, herundir innkeyp og viðlíkahald av hesum.

**Arbeiðsuppgávur**
Arbeiðið fevnir um viðlíkahald og umvæling av maskinum og øðrum hjá stovninum.

**Førleikakrøv**
Sóknast verður eftir fólki, sum hevur útbúgving sum entreprenørmaskinsmiður, maskinsmiður, lastbilasmiður ella sum hevur aðra viðkomandi útbúgving.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmálanum ímillum avvarðandi yrkisfelag og Føroya Handverksmeistarafelag.

**Umsóknir**
Umsóknir vera at senda til:

Landsverk
Postsmoga 78
110 Tórshavn

og skulu vera skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 20. desember 2005. Merkið brævbjálvan "Umsókn handverkari". Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Jóan Petur Patursson, rakstrarleiðari, á tlf. 422 420 ella 540 950.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

STARVSLÝSING

## Smiðjuformaður

Søkt verður eftir einum dugnaligum og álitandi smiðjuformanni til maskinmiðstøðina í Kollafirði. Maskinmiðstøðin hevur um hendi viðlíkahald av entreprenørmaskinum hjá Landsverki og høvuðsgoymslu av eykalutum og amboðum, herundir innkeyp og viðlíkahald av hesum.

**Arbeiðsuppgávur**
Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um at gera ætlanir fyri rakstrinum av smiðjuni og skipa fyri og leiða dagliga virksemið har. Harumframt skal viðkomandi gera metingar og tilmæli í sambandi við umvælingar av maskinamboðum. Saman við rakstrarleiðaranum á maskinmiðstøðini skal nýggja fólkið skipa fyri útleiging av amboðum innanhýsis og samstundis hava ábyrgdina av seramboðunum í smiðjuni. Annars hevur smiðjuformaðurin um hendi aðrar álagdar uppgávur so sum viðlíkahald av ferjulegum og øðrum í sambandi við hald av samferðslukervinum

**Førleikakrøv**
Vit sóknast eftir maskinmeistara ella fólki við aðrari viðkomandi útbúgving. Royndir innan økið er ein fyrimunur, tó eingin treyt. Góður teldukunnleiki krevst.

Umsøkjarin skal harumframt hava vanligt koyrikort.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars vera sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsóknir verða at senda til

Landsverk,
Postsmoga 78,
110 Tórshavn

og skulu verða skrivstovuni í hendi seinasta lagi 2. januar 2006. Merkið brævbjálvan "Umsókn smiðjuformaður". Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Jóan Petur Patursson, rakstrarleiðara, á tlf. 422 420 ella 540 950.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land